


# Fyrsta oljan frá russiska Arktis í apríl

**Jan Müller**

22.03.2014 - 20:56

Oljan.fo

**Russiska oljufelagið Gazprom ger seg nú tilreiðar at flyta fyrstu oljuna frá tess palli á** Prirazlomnaya oljuleiðini **í Pechora havium norðan fyri Russland longu í apríl. Hetta er pallurin, sum umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace í fjør royndi at koma sær uppá fyri at mótmæla boringini.**

Sambært tíðindastovuni Reuters eru russar við at gera ein tangabát kláran til at fara eftir hesi fyrstu lastini av olju frá tí nógv umstrídda pallinum. Roknað verður við, at tangabáturin fer við oljuni av oljuleiðini 10. apríl.

Talan er um fyrsta serútgjørda pall í heiminum, ið er bygdur til at arbeiða burturav í arktiskum øki við nógvum ísi.

Umhvørvisfelagsskapir hava mótmælt russisku oljuframleiðsluni her uppá tað harðasta og vísa á, at stórur vandi er fyri oljudálking í einum øki, har náttúran annars er vard av russiskari lóg.

Oljuleiðin varð funnin í 1989. Hon liggur í Pechora havninum á 20 metra dýpi einans 60 kilometrar úr landi.

Sjálv framleiðslan byrjaði í desember í fjør og var Gazprom við hesi framleiðsluni fyrsta landið í heiminum til at framleiða handilsligar nøgdir av olju til havs úr arktisku undirgrundini.

